# Avtala um leitibrunn á basaltøki

**Tíðindaskriv**

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, skrivaði hósdagin undir avtalu við Statoil samtakið fyri loyvi 006, um at flyta loyvisskyldur til ein leitibrunn á Brugdanleitimiðinum, sum liggur inni á basaltøkinum.

Avtalan, sum er eitt úrslit av samráðingum millum oljufeløgini og Oljufyrisitingina, førir við sær, at ein brunnur skal borast á loyvisøki 006 ístaðin fyri boriskyldurnar, sum eru eftir frá loyvunum 001 og 003.

Úrslitið av boringunum í loyvi 001 og 003 í 2001 ger, at oljufeløgini meta vánirnar at finna olju á hesum økjum at verða minni enn frammanundan mett, og tí halda bæði oljufeløgini og Oljufyrisitingin, at tað tænir oljuleitingini á føroyska økinum betur at flyta loyvisskyldurnar til eitt annað øki. Hóast olja varð funnin í Marjun brunninum í loyvi 001, verður út frá tí vitan, sum fyriliggur í dag mett, at nøgdirnar í Marjun brunninum ikki eru rakstrarverdugar.

Feløgini í loyvi 006 verða við hesi avtaluni: Statoil við 27.15%, DONG við 21.91%, Anadarko við 13.00%, Enterprise Oil (Shell) við 12.47%, Amerada Hess við 11.09%, BG Group við 10.31%, Føroya Kolvetni við 4.04% og Atlantic Petroleum við 0.03%.




*Umboð fyri tey 8 oljufeløgini her saman við Bjarna Djurholm, landsstýrismanni og Sigurð í Jákupsstovu, stjóra á Oljufyrisitingini*

*Mynd Jens K Vang*

Oljufyrisitingin er væl nøgd við, at ein avtala er gjørd um at bora hendan sera týdningamikla leitibrunn. Brunnurin skal borast á ein stóran struktur fyri at leita eftir kolvetni í jarðløgum undir basaltinum, harumframt gevur hetta okkum týðandi upplýsingar um jarðfrøðina á økinum til frama fyri framtíðar oljuleiting.

Loyvishavararnir í loyvi 006 hava gjørt avtalu um at leiga Stena Don boripallin at bora brunnin komandi summar.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, er sera fegin um, at avtala nú er gjørd um at bora enn ein brunn á basaltøkinum, eftir at ein líknandi avtala varð gjørd fyri loyvi 007 herfyri, og at báðir hesir brunnar verða boraðir næstu tvey árini. Landsstýrismaðurin sigur, at »hesir brunnar føra til framhaldandi leitivirksemi á landgrunninum og passa væl til okkara ætlan við øðrum loyvisumfari, sum var at bjóða eitt størri øki út, at fáa nýggj oljufeløg hendan vegin og at fáa gagn av virkseminum vestan fyri Hetland.«

# Byrjanin til nýtt tíðarskeið innan føroyska oljuleiting

**Tíðindaskriv**

Atlantic Petroleum hevur undirskrivað eina týdningarmikla avtalu við loyvi 006 bólkin og Oljufyrisitingina. Úrslitið av avtaluni er, at boriskyldurnar frá loyvi 001 og loyvi 003 verða fluttar til loyvi 006. Eisini fara loyvishavararnir í loyvi 001 at gerast partar í loyvi 006, saman við loyvishavarunum í loyvi 003.

»Atlantic Petroleum er sera væl nøgt við avtaluna, sum vit síggja sum verandi til fyrimuns fyri allar partar. Avtalan merkir, at eitt nýtt tíðarskeið innan oljuleiting byrjar á føroyska landgrunninum. Saman við øðrum arbeiði sum vit fara at luttaka í komandi ár, vil hetta geva okkum nógv betri vitan um møguleikarnar í økinum«, sigur Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum.



Fyri Atlantic Petroleum eru fleiri fyrimunir við nýggja samstarvinum.

Fyri tað fyrsta luttekur Atlantic Petroleum í boringini av leitingarmiðinum 'Brugdan', sum er ein sera stórur strukturur undir basaltinum, sum í besta føri kann innihalda stórar nøgdir av kolvetnum.

Fyri tað næsta vil hesin brunnurin, sum verður fyrsti brunnur, ið verður boraður gjøgnum basaltið, geva týdningarmiklar jarðfrøðiligar upplýsingar um hvat fjalir seg undir basaltinum, og betra vitanina um allan tann føroyska landgrunnin. Serliga týdningarmikil kann hendan vitan gerast fyri arbeiðið hjá Atlantic Petroleum í loyvunum 013 (40%) og 014 (40%), eftirsum at hesi øki eru lík økinum har leitingarmiðið 'Brugdan' er.

Fyri tað triðja hevur tað eydnast Atlantic Petroleum at flyta ta optiónsavtaluna frá loyvi 001 til loyvi 006. Hetta merkir, at Atlantic Petroleum luttekur við bert 0,025% av útreiðslunum og váðanum, meðan møguleiki er fyri at økja sín lut í loyvinum til 1,2905% um olja verður funnin við boringini.

At enda letur hendan avtala eisini upp nýggjar hurðar fyri Atlantic Petroleum, við tað at tætt samstarv verður við enn fleiri feløg. Gjøgnum sítt virksemi í Føroyum og Bretlandi

## Stanley útgávukonsert í Miðlahúsinum

Komandi mikukvøld kl. 20 hevur fuglfirðingurin Stanley Samuelsen útgávukonsert í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Stanley hevur júst givið út nýggja fløgu: »Sól og Regn«. Saman við Stanley vera eisini Gert Smedegaard, trummur og percussion og Knút Henriksen, bas. Hesir báðir eru ikki ókendir í tónleikahøpi, teir hava spælt saman við C.V. Jørgensen, Cornelis Vreeswijk o.ø.



Stanley fer eisini at hava konsertir í Mentanarhúsinum í Fuglafirði hósdagin 15. desember kl. 20 og í Fjørukrónni í Vestmanna fríggjadagin 15. desember kl. 20.30.

## Lovsangsbólkurin í Filadelfia útgávukonsert í Miðlahúsinum

Komandi týskvøld kl. 19.00 verður útgávukonsert í Miðlahúsinum. Tað er lovsangsbólkurin í Filadelfia í Havn, sum hevur útgávukonsertina í sambandi við, at bólkurin gav út lovsangsfløgu 6. desember í samarbeiði við Filadelfiaforlagið í Havn. Lovsangsbólkurin í Filadelfia í Havn hevur verið virkin innan í eini 10 ár og telur bólkurin 21 limir. Til útgávukonsertina koma eini 11 av hesum at framføra ein part av fløguni. Vantast kann at eisini okkurt gott gamalt verður at hoyra.

Tónleikurin, sum verður at hoyra, fevnir breitt frá bleytum poppi til harðan popp og er tað tí nakað til øll.

Øll eru hjartaliga vælkomin til tiltakið.